# Viðgera ikki roykjarar

Vandin fyri trupulleikum í sambandi við skurðviðgerðir er munandi størri, um sjúklingurin roykir, og tað hevur nú fingið skurðlæknarnar á fleiri svenskum sjúkrahúsum at sýta fyri at skurðviðgera roykjarar. Norrlands Universitetssykhus var tað fyrsta sjúkrahúsið, sum segði nei til at leggja roykjarar undir skurð, og nú hava fýra onnur sjúkrahús tikið somu avgerð. Enn hevur einki danskt sjúkrahús víst roykjarum frá sær, men formaðurin í regiónsráðnum, Bent Hansen, sigur við DR, at sjúkrahúsini fara uttan iva at leggja eina harðari linju í framtíðini, men tó neyvan so harða sum sviar.



# Dýrari fiskamjøl

Alt bendir á, at minni fiskamjøl verður á marknaðinum í framtíðini, og at prísurin tískil fer at hækka. Fiskifréttir skrivar, at framleiðslan hjá teimum fimm størstu framleiðarunum minkaði í fjør, og at hetta var framhald av einari gongd, sum byrjaði fyri nøkrum árum síðani. Tað var bara Kili, sum framleiddi meiri í fjør. FAO sigur, at í 2008 framleiddu fimm tey størstu framleiðaralondini var 2,7 milliónir tons. FAO sigur, at framleiðslan fer at minkia aftur í ár, og tá eftirspurningurin samstundis fer at veksa úr londum sum Kina, má roknast við, at prísurin fer at hækka í komandi mánaðum.

# Serfrøðingar gjørdu enda á Dimmalætting

**Tað, sum gjørdi enda á Dimmalætting var, at vit keyptu Vinnuvitan og Vikublaðið. Eg var alla tíðina ósamd við keypinum, men tað var ringt at standa ímóti sonevndari góðari ráðgeving, sigur Beata L. Samuelsen, fyrrverandi partaeigari**



*- Følir tú bæði í búkinum og í høvdinum, at ein avgerð er skeiv, skalt tú standa fast. Sama, hvat serfrøðingar royna at sannføra teg um. Tað er lærupengin, Beata L. Samuelsen hevur fingið burtur úr fíggjarliga samanbrotinum hjá familjufyritøkuni, Dimmalætting*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

DIMMALÆTTING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Følir tú tað í búkinum og í høvdinum, at ein avgerð er skeiv, skalt tú halda fast við tína støðu, sama hvat serfrøðingar og ráðgevarar halda.

Tað er ein lærupengi, sum Beata L. Samuelsen hevur fingið burtur úr samanbrotinum hjá Dimmalætting, har hon var næststørsti privati partaeigari.

Hon sigur, at tað, sum beindi fyri Dimmalætting, var, at tey keyptu Vinnuvitan og Vikublaðið.

- Tað var hetta, sum førdi til fíggjarliga undirgangin hjá okkum, tí tann íløgan bar seg yvirhøvur ikki.

## Ein dýrur lærupengi

Beata L. Samuelsen sigur, at hon var ongantíð samd í hesum keypinum.

Og sæð í bakspegilin heldur hon, at hon skuldi staðið føst í síni støðu um at vera ímóti keypinum.

- Men eg eri ikki handilsfólk. Og samstundis hálovaðu serfrøðingar og ráðgevarar keypinum og greiddu okkum frá, hvussu fantastisk íløgan var.

Beata sigur, at tí var tað ringt at standa ímóti.

Men hon leggur afturat, at tað, hon hevur lært av hesum, er, at tú skalt altíð lurta eftir tær sjálvum, og ikki slaka, sama hvat serfrøðingar siga.

Tað er lærupengurin, Beata L. Samuelsen hevur fingið burtur úr hesum, sjálvt um hon ásannar, at lærupengin var dýrur.

## Ikki ókend kensla

Men sjálvt um lærupeningurin var dýrur er onki at gera við tað í dag.

Og kenslan av at missa, er ikki heilt ókend fyri Beatu.

- Í kreppuni í nítiárunum misti eg míni egnu hús, tá ið eg ikki megnaði at rinda rentur og avdráttir. So eg veit, hvat tað vil siga, at missa ognir.

- Men eg veit eisini, at tað ber væl til at reisast aftur, tí tað er bara at líta frameftir. Hetta eru hóast alt ikki annað enn deyðir lutur, og tá ið tú hevur eitt ljóst sinni og áræðið, hevur tað innast inni ongan týdning, sum so.

## Mátti ganga galið

Men so staðfestir hon eisini, at hon hevur havt ríkiligt av tíð til at venja seg við tankan um at missa Dimmalætting, tí raksturin hevur leingi verið so tungur.

- Skuldin varð blivin so stór, at tað bar ikki til longur. Tí hevur tað rættiliga leingi verið greitt fyri øllum, at broytingar máttu til.

Og innast inni hevur hon tað fínt við, at Dimmalætting nú er seld. Tí nú kann blaðið halda fram.

- Tað gongur upp í niður í lívinum. Og soleiðis sum støðan hjá Dimmalætting var blivin, var hetta nakað, sum ikki slepst undan.

Beata L. Samuelsen vil enntá kalla tað eitt sindur av einum lætta, at ein avgerð nú er tikin, tí tað er eisini ein byrða, sum er tikin av hennara herðum.

- Áðrenn vistu vit ikki, hvar vit flutu. Nú er ein avgerð tikin og vit hava fingið nýggjar eigarar, sum trúgva upp á blaðið.

## Eitt liðugt kapittul

Nú Dimmalætting er seld, hava nýggju eigararnir beinanvegin gjørt greitt, at *Dimmalætting skal seljast burtur úr samtakinum aftur. Kann tað hugsast at Beata L. Samuelsen fer at liggja framvið?*

- Nei, svarar hon avgjørd.

- Tað tími eg ikki. Og tað vænti eg heldur ikki, at míni børn hava hug til. Hetta er eitt liðugt kapittul og nú er bara at njóta lívið og taka ein dag ísenn.



*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Eg sovi væl um náttina

**- Sjálvandi er tað keðiligt at hava mist Dimmalætting úr familjuni, men tað er ein bøtiligur skaði tí ongin er deyður, sigur Beata L. Samuelsen, næststørsti eigari í Dimmalætting**

FAMILJUFYRITØKA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sigur tú Dimmalætting, mást tú eisini siga Samuelsen.

Soleiðis hevur verið í samfull 122 ár.

Tí eru tað tvey fyribrigdi, sum hava verið samantvinnað í føroyska samfelagnum er tað blaðið Dimmalætting og Samuelsen ættin í Havn.

Men eftir at Dimmalætting hevur verið í Samuelsen ættini í meiri enn eina heila øld, varð blaðið selt í gjár og nú er tað sostatt eisini farin tíð, at Samuelsen navnið og Dimmalætting verða óloysiliga knýtt saman.

Vit hava spurt Beatu L. Samuelsen um tað ikki følist svárt at hava mist familjufyritøkuna av hondunum.

Sjálv var Beata næststørsti privati partaeigari í Dimmalætting og harafturat hevur hon verið tíðindakvinna á blaðnum heilt síðani 1. august í í 1967, tá ið kom í starv har bara 20 ára gomul, beint eftir lokið studentsprógv.

Men eisini áðrenn tað eigur hon nógv spor á blaðnum, tí hon plagdi eisini vera inni á gólvinum sum barn.

## Bøtiligur skaði

Men at blaðið nú er selt, tekur hon ikki so øgiliga tungt.

Sjálvandi eri eg kedd, tí eg hevði kenslur fyri blaðnum.

Men nakar persónligur sorgarleikur er tað yvirhøvur ikki

- Harraguð, ongin er deyður, staðfestir hon!

Hvussu framtíðin hjá Beatu sær út á Dimmu veit hon ikki.

- Stendur tað til mín, haldi eg fram í starvinum her, men alt veldst um, hvat nýggju eigararnir halda um tann spurningin og tað veit eg so ikki, tí eg kenni teir ikki, sigur hon.

Men hon sigur, at tað verður onki øðrvísi at arbeiða á Dimmu undir nýggjum eigarum, sum tað var frammanundan.

- Eg havi altíð følt tað sum mítt arbeiðspláss og haldi eg fram, verður tann kenslan ikki øðrvísi. Men eftirsum eg havi havt so tætt persónligt tilknýti til blaðið, dylir hon ikki fyri, at hon hevur følt hetta sum nakað serligt at arbeiða á blaðnum.